

# Norðurlendskur orkufundur í Føroyum

**Jan Müller**

23.06.2015 - 13:54

Oljan.fo

Í døgunum 24.-25. Juni er Jarðfeingi vertur fyri norðurlendskum fundum um orku. Í hesum sambandi verður eitt orkuseminar fyri innbodnum í Norðurlandahúsinum mikudagin og hósdagin.

Tað eru EKE (Embedsmandskomitéen for Energi) og NEF (Nordisk Energiforskning), ið hoyra til Nordisk Ministerråd, sum í døgunum 23. til 25. juni halda fundir í Føroyum.

Í hesum sambandi verður skipað fyri ráðstevnu fyri innbodnum um føroysk orkumál við serligum denti á elorku og samstarv um menning og gransking.

Millum mongu evnini, sum verða viðgjørd, eru m.a.: “Status for energisituationen på Færøerne” við Bjarta Thomsen, Jarðfeingi, “Elproduktion, status 2015 og fremtidige planer”, Finn Jakobsen, SEV, “Perspektiv ved brug av vedvarende energi på

energiområdet/elområdet” við Kim Andersen, Dansk Energi, “Muligheder for forskning og samarbejde på energiområdet” við Sigurð í Jákupstovu og Bárður Niclasen, Fróðskaparsetrið, “Nordisk energiforskning på/med Færøerne" við Hans Jørgen Koch, stjóri í NEF, “Fleksibilitet, energilagring og konvertering. Konkrete projekteksempler” við Inger Pihl Byriel, Engerginet.dk, “Vindernergi på Færøerne” við Terja Nielsen, SEV, “Drivere for elektrifisering af energiforbruget” við Pól Egholm, VMR, og “Europeisk forskning og udvikling på netområdet. Indpasning af mere vedvarende energi", Inger Pihl Byriel